# illum Kirkjubøstólarnar





*Konsert við Tórshavnar Kamarkóri í hábærsligum umhvørvi á Føroya Fornminnissavni, har kirkjubøstólarnir verða sýndir fram. Kórleiðari er Kári Bæk*







kirkjubøstólunum. Stólarnir eru gjørdir fyrst í 1400-talinum í Bergen. Teir lýsa fleiri halgisøgur um ápostlarnar og onnur halgimenni.

Kirkjubøstólarnir vórðu millum mangar aðrar gripir fluttir heim til Føroya úr Danmark í 2002 sambært avtalu millum Danmarks Nationalmuseum og Føroya Fornminnissavn.

Løtan á Føroya Fornminnissavni var sera hugnalig og serstøk, og vísir at hølini eru væl egnaði til slík tiltøk.

Annars er at siga, at Tórshavnar Kamarkór, sum Ólavur Jøkladal setti á stovn í 1985, hevur 20 ár á baki í ár, og verður hetta hátíðarhildið við jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum 30. apríl. Kári Bæk er leiðari hjá Tórshavnar Kamarkóri.